

*Vígdis saman við mammuni, Jónu Fridu Hentze*

# Vígdis gongur sínar egnu leiðir

**Hóskvøldið kann Vígdis Hentze Olsen gerast besti dansari í Danmark, vinna kr. 250.000 og eitt skeið á einum av heimsins bestu dansiskúlum í New York. Vit hava í práti við mammu Vígdis hugt afturum ungu kvinnuna, ið hevur dansað seg beint inn í hjørtuni á føroyingum og dønum.**

DANSUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Jóna Frida Hentze kom til Danmarkar hósdagin 16. november at stuðla dóttir síni Vígdis Hentze Olsen, nú tað nærkaðist endanum í Kan Du Danse?

Hóast Vígdis hetta kvøldið kundi verið send heim, so var ætlanin alla tíðina at vera í Danmark til aftan á finaluna. Hetta var tó ikki orsakað av eini blindari sannføring um, at dótturin fór at enda í finaluni.

- Vígdis segði longu tá, at hon líka væl sum onkur annar kundi verða send heim. Tí støðið var so høgt, at tað kundi verða smáar detaljur, ið gjørdu av hvør var sendur heim, so eg væntaði einki. Um tað skuldi hent, at hon varð send heim, so kundu vit fari saman at hugt at finaluni, greiður Jóna Hentze, tá vit hitta hana yvirum ein kaffimunn við borðið í lítlu íbúðini hjá Vígdis á Vesterbro.

### Ger gerandisdagin lættari

- Eg hevði møguleika fyri at fáa frí og vildi tí gjarna niður at hjálpa henni hesar vikurnar. Eg royni at gera hennara dagligdag lættari. Geri reint, ruddi, vaski klæði, koyri hana ymsa staðni og hjálpi við matgerðini. Hetta við matgerðini er tó ikki altíð so lætt. Vígdis etur sera sunnan kost, proteinríkan og kaloriufátækan, nógv grønmeti, fisk og bert hvítt kjøt. Hon etur heldur ikki eftir klokkan sjey um kvøldið.

Jóna hevur vitjað dóttur sína javnan, síðan hon fór uttanlands í útbúgvingarørindum. Tá Vígdis flutti til Svøríkið at læra til yrkisdansara á Ballettakademinum í Göteborg, fór mamman til Keypmannahavnar at hjálpa henni við flytingini, og tá hon flutti aftur til Keypmannahavnar eftir lokna útbúgving í summar, fór Jóna somuleiðis til Svøríki at hjálpa við flytingini.

- Eg var í Svøríki umleið tvær ferðir um árið, meðan hon gekk á skúla har. Vígdis arbeiður so seriøst við dansinum, at hon t.d. ikki hevur havt tíða at vitja heima í Føroyum seinasta árið, so tí er eisini gott at sleppa niður at vitja hana, sigur Jóna.

### Kom ikki heim aftur

Tað er kanska heldur ikki undarligt, at mamman roynir at vera um dóttur sína, hóast hon hevur búð uttanfyri landoddarnar í fleiri ár. Vígdis var nevniliga ikki eldri enn 15 ár, tá hon flutti úr Føroyum til Fjón, har hon fór á ítróttareftirskúla, og síðan tá hevur hon ikki búð heima.

Tað var við blandaðum kenslum, at foreldrini lótu Vígdis fara á eftirskúla, hóast hon var so ung. Systir Vígdis, Tórgerð hevði árið frammanundan verið á ítróttareftirskúla og tí var hetta ikki nýtt fyri tey. Tað hevði eisini alla tíðina ligið í kortunum, at Vígdis skuldi á eftirskúla í Danmark. Vígdis hevði fyrireikað seg væl bæði í ballett og fimleiki, so hetta var nakað, ið tey øll vóru spent um. Eisini var alla tíðina ætlanin, at Vígdis skuldi koma heim til Føroyar at ganga á studentaskúla, tá árið á eftirskúlanum var av.

- Á eftirskúlanum vóru ummælini sera góð, og tey heittu á Vígdis at fara víðari við dansinum. Vígdis fann og syrgdi sjálv fyri at slepp inn grundútbúgvingina í dansi á Steps í Keypmannahavn, greiðir Jóna frá. Hon metir, at hetta var løtan, tá hon skilti, at Vígdis fór at velja dansin, sum sín yrkisveg.

Tað gjørdist skjótt greitt, at Vígdis ikki hevði tíð til 3 ár á studentaskúlanum. Eftir grundútbúgvingina í Keypammanhavn, ætlaði hon sær til New York á dansiskúla.

- Tá føldu vit okkum eitt sindur ótrygg við hetta. Hon var ikki blivin 18, og vit mettu, at hon var for bleyt og ung til at skula einsamøll til New York. So vit royndu at tosað við hana, um at fara á dansilinjuna á sjónleikarskúlanum í Keypmannahavn í staðin. Men hetta vildi hon ikki. Hon helt ikki hesa linju vera nóg seriøsa. Men til alla lukku so fóru fleiri, sum hon gekk í skúla saman við á Steps til Göteborg at læra á Ballettakademinum, og Vígdis fór eisini hagar, greiðir Jóna frá.

Tað var tó ikki heilt einfalt, hjá Vígdis at sleppa inn á Balletakademiið. Her kravdist studentaskúli, tí talan er um eina universitetsútbúgving. Men í upptøkuroyndini sannførdi Vígdis upptøkunevndina um, at hon skuldi vera ein av teimum 12 í sloppu inn hetta skúlaárið.

Umframt prógvið, sum Vígdis tók á Ballettakademinum í juni í ár, var hennara avrik somikið gott, at hon varð vald ársins dansari á skúlanum.

Vinnur Vígdis finaluna í Kan Du Danse? er ein av vinningunum dansiskeið í New York, so kanska gamli dreymurin nú gerst veruleiki.

### Gongur egnar leiðir

Tað er ikki trupult at síggja, at Jóna er errin av dóttrini, ið nú er vorðin eitt kent andlit bæði í Føroyum og í Danmark. Hon sigur:

- Eg eri so trygg við øllum sum hon ger, tí Vígdis ger bara tað, sum hon vil, og hon er bevíst um hvat hon vil. Vígdis hevur altíð torað at gingið sínar egnu leiðir, og hevur ikki latið seg stýrt av hvat hini halda og vilja.

### Stuttligt at hitta fjepparar

Men hvussu hevur upplivingin verið, at sæð Vígdis